


Niels Uni Dam er 33 ár og blaðmaður á Sosialinum. Honum dámar væl at ferðast. Hann hevur ferðast rættiliga fitt í lívi sínum, mest kring Evropa men eisini eitt so fjarskotið stað sum Ný Sæland. Í hesum døgum sigur Niels Uni okkum 10 ferðamál, ið hann hevur hug at vitja. Hann sigur, at hetta verður eitt gott bland av støðum, ið hann hevur vitjað og vil vitja aftur, støðum, ið hann ongantíð hevur vitjað, men kundi hugsað sær at vitjað.



## Dreymaferð nr. 1:

# Kalifornia



*Los Angeles er ein spennandi stórbýur, ið eg fegin vil vitja*

Kalifornia virkar sera lokkandi fyri meg. Býir sum San Francisco, Los Angeles og sjálvandi Hollywood kenna vit øll úr sjónvarpi og filmum heilt frá barnsbeini. Mentanin, ið er sprottin úr hesum umhvørvið er ivaleyst tann størsta mentanarliga ávirkanin, ið vit hava í okkara samfelagi.

Eg haldi, at eg altíð havi havt hug at vitja henda stóra og spennandi stat í USA. Í 80'árunum var tað serliga býurin Santa Cruz, ið eg vildi sleppa at vitja. Hetta var tá skate board høvuðsstaðurin í heiminum. Í øðrum pørtum av pubertetunum var tað nógvu strendurnar við hálvnaknu kvinnunum, ið vóru spennandi. Eitt sindur vaksnari er tað alt møguligt. Staturin er á tremur við upplivingum, ið bíða eftir mær. T.d. tónleikapallurin í Los Angeles, sum hevur fostrað so nógvar spennandi bólkar. Hetta er mín dreymaferð nr. 1.




















